## Takk

**VB takkar øllum, ið tóku lut á Jólasølustevnuni 2003.**

Vit ynskja øllum gleðilig jól og eydnuberandi nýggjár.

Takk fyri góðan stuðul í farna ári

1905 VB



SJÓVAR KOMMUNA

## Kunngerð

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at vallistin til løgtingsvalið tann 20. januar 2004, liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá týsdegnum 16. desember til fríggjadagin 19. desember 2003.

Kæra um, at onkur ikki er á vallistanum, ella onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera kommunustýrinum í hendi seinast 22. desember 2003.

Valkort verða send øllum veljarum, ið valrætt hava valdagin.

**Sjóvar kommuna**



## Ruddingartilboð

Brúktir trukkar fáast frá 5000,- kr.

Tilboðið er galdandi nú, og allan januar mánaða.

Setið tykkum í samband við okkum

**SP/F NORÐ TRUKK**
Mykinesgøta 3 · Postrúm 1315
110 Tórshavn
Tlf. 315136 / 215136 · Fax 310931
E-mail: nordtruk@nordtrukk.fo

Sosialurin 341800





## Góðir brúktir bilar

**Nissan Almera 2.0 Diesel** vínreyður, árg 1999, 4 hurðar, km. 61.000 **nú 89.000**

**Opel Zafira 2.0 Dti Comfort** bláur, árg 2000, 7 sitipláss 5 hurðar, km. 77.000 **155.000**

**Nissan Almera 1.6 GX** grønur, árg 1999, 4 hurðar, km 76.000 **89.000**

**Opel Vectra 1.7 DT** grønur, árg 1995, 4 hurðar, km. 210.000 **65.000**

**Nissan Almera 1.5 Comfort** bláur, árg 2002, 5 hurðar, km 11.000 **140.000**

**Opel Vectra 1.7 DT** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km. 195.000 **79.000**

**Nissan Almera 1.6 GX** vínreyður, árg 2000, 4 hurðar, km 88.000 **nú 95.000**

**Opel Vectra 1.7 DT** bláur, árg 1996, 5 hurðar, km. 125.000 **85.000**

**Nissan Patrol 3.0Di Van** grønur, árg 2000, 3 hurðar, Verður seldur fyri kunda **200.000**

**Ssangyong Musso 2.9D 100 HK Van** grønur, árg 1997, 5 hurðar, km. 102.000 **130.000**

**Peugeot 306 Diesel Turbo** gráur, árg. 1995, 4 hurðar, fyrr 65.000,- km. 206.000, toppstykkið skift **nú 45.000**

**Citroen Xantia 2.0 Hdi Station Car** grønur árg. 2000, km. 110.000 **150.000**

**Peugeot 406 1.8** grønur, árg. 1997, 4 hurðar, km. 129.000 **99.000**

**Ford Fiesta 1.3** reyður, árg 1997, km. 88.000 **46.000**

**Peugeot 406 ST 2.0** gráur, árg. 1999, 4 hurðar **130.000**

**Ford Escort 1.8d** bláur, árg 1997, 5 hurðar, km. 127.000, fyrr 57.000,- **nú 35.000**

**Opel Astra 1.6 Station car** hvítur, árg 1996, 5 hurðar, km. 61.000 **68.000**

**Ford Escort 1.8** bláur, árg 1995, 4 hurðar, km. 101.000 **59.000**

**Opel Astra 1.4 16V** grønur, árg 1996, 3 hurðar, km. 114.000 **53.000**

**Ford Orion 1.8 Diesel** bláur, árg 1991, 4 hurðar, km. 131.000 **25.000**

**Opel Astra 2.0 Di Sedan** vínreyður, árg 2000, 4 hurðar, km. 97.000 **115.000**

**Hyundai Accent** gráur, árg 2000, 5 hurðar, km. 92.000 **112.000**

**Opel Astra 1.6 16V Stc** gráur, árg 1999, 5 hurðar **110.000**

**Mazda E-serie 2200 Diesel** gráur, árg 2002, 5 hurðar, km. 17.000, skrásettur sum persónbilur **v/mvg 175.000**

**Opel Astra 1.7 DT** grønur, árg 1997, 4 hurðar **65.000**

**VW Transporter 2.5DTi Van** reyður, árg 1998, 4 hurðar, km. 95.000 **v/mvg 130.000**

**Opel Astra 1.7 DT** grønur, árg 1999, 5 hurðar, km. 97.000 **119.000**

**Toyota Corolla 1.3 XLi** reyður, árg 1997, 3 hurðar, km. 79.000 **67.000**

**Opel Astra 1.6 Comfort** svartur, árg 1998, 5 hurðar, km. 77.000 **95.000**

**Toyota Carina E 1.6** hvítur, árg 1995, 4 hurðar, km. 138.000 **67.000**

**Opel Zafira 1.6** gráur, árg 1999, 7 sitipláss 5 hurðar, km. 61.000 **v/mvg 130.000**

**Toyota Corolla 1.6 Star Linia Terra** grønur, árg 2002, 5 hurðar, km. 18.000, seldur fyri kunda **160.000**

**Opel Zafira 2.0 Dti Comfort** gráur, árg 2000, 7 sitipláss 5 hurðar, km. 40.000 **165.000**

Sosialurin 341800

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61



# Haldið Sosialin!

400,- kr. um ársfjórðingin

- sparið 380,- kr. í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:

**Ókeypis** Verður sent ópostað Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn



# ítróttur

Nr. 239 • týsdagur • 16. desember 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


# Tríggir landsdystir í februar



*Allan Simonsen skal nú royna seg ímóti Føroyum. Á venjingarleguni hjá fótbóltslandsliðnum verður Luxemburg nevnliga eitt av mótstøðuliðum okkara*

**Sjónvarpssáttmálin við Sport Five ber møguleikan við sær, at Føroyar kunnu spæla tríggjar fótbóltslandsdystir í Spania í februar**

FÓTBÓLTSLANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Fótbóltsspælararnir, sum fara við landsliðnum á venjingarleguna í Spania eftir februar fáa altjóða skrásettar landsdystir upp á loggið. Tað tykist vera púra greitt nú. Landsliðið skal á venjingarlegu í Cadiz í Suðurspania. Ferðalagið verður burtur frá 15. og til 25. februar, og mótstøðuliðini verða Andorra, Luksemborg og Pólland.

– Vit hava sáttmála við Sport Five um rættin at sjónvarpa okkara landsdystir. Hetta felagið hevur eisini sáttmálar við Luksemborg og Pólland. Sport Five rindar fyri venjingarleguna hjá okkum, og eg rokni bara við, at teir eisini rinda fyri venjingarlegurnar hjá Póllandi og Luksemborg. Ætlanin er, at dysturin hjá Póllandi skal sendast í pólverskum sjónvarpi.

Hetta sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum. Í FSF eru tey farin undir fyrireikingarnar til venjingarleguna í Spania. Tað verður neyvan fyrr enn eftir ársskiftið, at tað fæst at vita, hvørjir spælarar fara at fáa landsliðsboð. Tí uppgávuna standa Henrik Larsen, venjari, og Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjari, fyri.

### Ikki vánaligar royndir

Í løtuni hvíla allir teir føroysku landsliðsspælararnir seg. Eingin kapping er á skránni. Kortini verður gjørt eitt sindur meiri við venjingina, enn tað plagar at vera hesa ársins tíðina. Í góða heystarveðrinum hava spælarar í fleiri feløgum verið at sæð á vøllunum.

Spurningurin er kortini, hvussu tað fer at hilnast, tá ið landsliðið skal spæla tríggjar ferðir í tíggju dagar og bara einar tríggjar vikur eftir, at spælararnir eru farnir undir aftur regluligu venjingarnar í feløgunum.

Føroyska landsliðið hevur áður verið í somu støðu, og tá hevur tað úrslitaliga roynst rættuliga væl. Dømi um hetta eru at finna hesi seinastu árini. Í februar í ár vunnu Føroyar 1-0 á Liktinstein á venjingarleguni, sum var á Kypros, meðan Føroyar tríggjar dagar frammanundan taptu 2–1 ímóti Póllandi. Tann dysturin varð eisini spældur á Kypros.

Í fjør spældu Føroyar í NM kappingini ímóti Svøríki. Tann dysturin var 31. januar í innandura høll í Växjö. Úrslitið var málleysur javnleikur. Í 2000 spældu Føroyar tveir dystir í La Manga um mánaðarskiftið januar/februar. Ímóti Finnlandi taptu Føroyar 1–0, og ímóti Íslandi var úrslitið 2–3, eftir at Føroyar eina løtu høvdu verið á odda 2–0. Síðstu løtuna vísti tað seg, at íslendingarnir vóru í betri venjing enn føroyingarnir.

### Gamal dreymur

Síðani Allan Simonsen fyri tveimum árum síðani gavst sum venjari hjá føroyska landsliðnum og gjørdist venjari hjá Luksemborg, hevur tað verið tosað um, at Føroyar og Luksemborg skuldu spæla landsdyst. Ikki minst Allan Simonsen hevur verið ógvuliga áhugaður í at fáa ein vinardyst ímóti fyrrverandi undirsáttunum hjá sær. Nú tykist tað sum um, at hetta fer at gerast til veruleika.

Føroyar og Luksemborg hava spælt tveir HM undankappingardystir, og føroyingarnir við Allani Simonsen sum venjara vunnu báðu ferðirnar. Í Luksemborg var úrslitið 2–0, og í oysandi áarføri á Svangaskarði var úrslitið 1–0.

## Hóttan móti ólavsøkufinaluni

**Undanumfar í UEFA Cup kappingini er á skránni sjálvan ólavsøkudag**

STEYPAFINALAN
*Jákup Mørk*

Skal finalan um Løgmanssteypið spælast á Ólavsøku, og skal hon spælast á grasvøllinum. Síðani Tórsvøllur gjørdist veruleiki, hevur hetta verið ein spurningur, sum aftur og aftur hevur verið havdur á lofti.

Eisini eftir finaluna í ár varð tosað um hetta. Víst varð á, at fótbóltsspælið ikki hevur verið serliga sannførandi, síðani finalan varð flutt til á Ólavsøku. Orsøkirnar hava verið mettar at vera tvær. Onnur hevur verið søgd at vera, at spælararnir ikki eru so vanir at spæla á grasi, og at fótbóltsspælið hevði verið væl betri, um spælt hevði verið á graslíkinum. Tað kundi finalan verið á Ólavsøku fyri.

Hin orsøkin til at spælið ikki hevur verið so gott, hevur verið mett at verið dagfestingin. Spælararnir eru ikki í nóg góðari dystarvenjing á Ólavsøku, tí teir hava ikki spælt í landskappingini í tríggjar vikur.

Hesin spurningurin varð aftur havdur á lofti, tá ið FSF og feløgini í november eftirmettu kappingina, men tá varð eingin onnur niðurstøða gjørd. Tí er tað framvegis soleiðis, at finalan skal spælast á Tórsvølli á Ólavsøku.

### UEFA broytir

Nú kann tað kortini fara at vísa seg, at tað verður neyðugt at flyta finaluna. Orsøkin til hetta er ikki føroyskur fótbóltur, men UEFA og Europa Cup kappingin.

Í skránni fyri UEFA Cup kappingina næsta ár sæst, at annar dysturin í fyrsta umfarinum í UEFA kappingini er ásettur at vera sjálvan Ólavsøkudag, sum er 29. juli. Tá ið tað neyvan ber til at fáa UEFA at broyta skránna, verður tað ivaleyst neyðugt at flyta føroysku steypafinaluna, um annað av finaluliðunum skal spæla í UEFA Cup.

Føroysku feløgini i europeisku kappingini næsta ár vera HB, B36 og B68. B68 hevur bara eina ferð verið í steypafinaluni. Havnarfeløgini eru mest sum hvørt ár partur av finaluni.

Tríggjar finalur hava verið á Tórsvølli. Tann fyrsta var í 2001, tá ið B36 vann á KÍ. Í fjør vann NSÍ á HB, og í ár vann B36 á GÍ.

Um eitt føroyskt felag fær heimavøll á Ólavsøku, hevði tað sjálvandi verið ein møguleiki at spælt á Svangaskarði. Men tað hevði verið heilt margháttligt, at týdningarmikil fótbóltsdystur hevði verið í Føroyum og uttanfyri Havnina á Ólavsøku. Serliga um annað av havnarfeløgunum var partur í hesum dystinum!